# MASKINMEISTARIN

Nr. 5 / Juli 2018





## Stívrend støða elvir til útflagging



## Formansfrágreiðingin



## 17 Maskinmeistarir fingu prógv

# Ein rúgva av maskinum og tøkni á Bakkafrosti

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**Blaðnevnd**
Ólavur Gunnarsson, ábyrgd

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda MASKINMEISTARAN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,– kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Endurgeving bert loyvd samsvarandi lógini um upphavsrætt. MASKINMEISTARIN kann takast niður sum pdf á heimasíðuni hjá felagnum, www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
*Verksmiðjan í Bakkafrost:*
Grækaris Djurhuus Magnussen
*Ólavur Gunnarsson á skrivstovuni:*
Ingolf S. Olsen
*Formansfrágreiðingin:*
Øssur Winthereig
*Prógvhandan:*
Erland Hentze Rasmussen

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting, prent og liðugtgerð**
Estra 478500

Upplag: 800

## INNIHALD

Formansfrágreiðingin ........ 5
Nýggja nevndin ........ 9
Stívrend støða elvir til útflagging ........ 12
Fiskimannafelagið stendur fast ........ 14
17 Maskinmeistarar fingu prógv ........ 16
Maskinstjóri á Bakkafrost ........ 19
Lítillátni maskinmeistarin ........ 25
NMF fyllir 100 ........ 28
Sáttmálin við KAF er ein avbjóðing ........ 29
Føðingardagar ........ 30
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum ........ 31










# Fakfelagið sum virkin viðspælari

Hvussu sært tú upp á eitt fakfelag? Ert tú yvirhøvur limur, ella ert tú ein av teimum, sum heldur, at tíðin er farin frá fakfeløgunum.

Hesum eri eg als ikki samdur í.

Um vit ikki hava onkran at halda í herðatoppinum á arbeiðsgevarunum, so vildu teir uttan iva gjørt sær dælt av støðuni, og korini hjá tí einstaka vildu so við tíðini verið hareftir.

Vit mugu vera fullgreiðir yvir, at einki kemur av sær sjálvum, og at aftan fyri øll vunnin rættindir liggja stór stríð.

Ikki so sjáldan rennir tú teg í onkran, sum fýlist á, at man far so lítið fyri limagjaldið. Her veldst sanniliga um eygað sum sær, tí hvussu var støðan, um onkur ikki hevði framsett krøv tína vegna og staðið fast, um tað so breyt í bæði borð?

Vit hava endurnýggjað fleiri sáttmálar, bæði á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum. Felagið varar av á leið 20 størri og smærri sáttmálum.

Tað ber altíð til at kjakast um, um samráðingarúrlitið er nóg gott, men vit hava kempa við øllum, vit hava, fyri at náa nøktandi úrslitum. Einsamallur hevði tú valla kunna gjørt so nógv í slíkum føri. Slíkt kann bara lata seg gera, um vit standa saman og vísa okkara styrki.

Hettar er ein partur av arbeiðinum hjá felagnum, men harumframt er ein rúgva av øðrum uppgávum, eitt nú eru tað ikki so fá persónsmál, sum koma inn um gáttina. Tað kann eitt nú vera talan um tulkingarspurningar um ymiskt, har arbeiðgevarin og -takarin hava ymiskar útleggingar av somu søk. Hesi mál verða sum oftast loyst í sátt og semju, eftir at meklað hevur verið, men tað kemur meira enn so fyri, at sakførari má upp í leikin fyri at loysa knútin, og av og á endar tað við sakarmáli.

Alt hettar verður gjørt av felagnum vegna limirnar.

Tíanverri er tað ikki so sjáldan, at maskinmeistari, sum av einari ella aðrari orsøk hevur valt ikki at verða limur, spyr, um vit kunnu hjálpa, tí hann er komin illa fyri á ein ella annan hátt. Eisini hava vit sæð, at onkur roynir at melda seg inn, fyri eftirfylgjandi at fáa felagið at taka sleipið.

Men her røkka vit ikki til.

Vit eru er til fyri limirnar, og bara teir. Fólk sum velja okkum frá, mugu gera sær greitt, at hetta inniber, at tey eru yvirlatin til sín sjálvs, tá ið tey hava rent seg føst í arbeiðhøpi.

Vit vildu so gjarna verið til enn meira nyttu fyri limir okkara. Ætlanin er at skipa fyri regluligum limatiltøkum, eisini kring landið, har vit lýsa ymiskt av felags áhuga.

Eg vóni, at vit kunnu minka fjarstøðuna millum nevnd og limir. Um okkurt rørist í tykkum, og tit meta at gott hevði verið at vent hettar við onkran, komið tá til okkara, so skulu vit hjálpa at kasta meira ljós á tingini.



**Ólavur Gunnarsson**
*– formaður í Maskinmeistarafelagnum*



# SKEIÐ Á VINNUHÁSKÚLANUM

## VINNUHÁSKÚLIN

- BRM-skeið
- ERM-skeið
- Ship Handling
- Skeið í heilsulæru og endurnýggjan
- ARPA-skeið
- ECDIS-skeið
- Tecdis-skeið
- SSO-skeið
- § 16-skeið
- ISPS-skeið
- Endurnýggjan av vinnubrøvum
- Tankers Safety-skeið
- Flutningur av vandamiklum farmi
- Ketilpassaraskeið
- GMDSS-skeið
- LRC-skeið
- GOC-skeið og endurnýggjan
- DP Basic/induction
- DP Advanced/Simulator
- DP endurnýggjan
- AIS
- Tankers familiarisation
- Háspenningsskeið maskinmeistarar
- Háspenningsskeið maskinistar

## TRYGDARDEPILIN VIÐ ÁIR

- Eldsløkking umborð á skipi
- Endurtøkuskeið eldsløkking u.s.
- Sløkkileiðsla umborð á skipi
- Eldsløkking fyri skipsyvirmenn
- Endurtøka IMO 80
- Trygdarskeið grundleggjandi
- Trygdarskeið fult
- FRC-grundskeið
- Bátaføraraskeið
- Medisinsk fyrstahjálp
- Stroppaskeið

Skeiðini eru sambært STCW-sáttmálanum við broytingum frá 2010.
Koturnar til skeiðini finnast á heimasíðu skúlans.

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING




*Framhald á næstu síðu >>*



# Ógvusligar bylgjur um fiskiveiðuskipanina

*- Kanska broytingarnar ikki eru so ógvusligar, sum onkur royndi at mála tær til, segði Páll Hansen í sini seinastu fundarfrágreiðing á aðalfundinum hjá felagnum.*

**TEKSTUR OG MYNDIR:** ØSSUR WINTHEREIG - PRESS

Uppskot um nýggja fiskiveiðuskipan hevur fylt ógvuliga nógv í farna ári. Man kann róliga siga, at bylgjurnar hava verið ógvusligar til tíðir.

Uppskotið bleiv so samtykt nakað áðrenn jól undir stórum tíðarpressi, sum neyvan hevur gjørt arbeiðið við uppskotinum lættari ella betri.

Í hoyringsskrivi sum Maskinmeistarafelagið hevur latið inn, vístu vit á, at felagið metti, at um allar tær ætlaðu broytingarnar innan fiskivinnuna verða framdar, so kunnu tær í longdini føra til versnandi sáttmálaviðurskifti hjá limum felagsins innan fiskivinnu, og við atliti til hetta er Maskinmeistarafelagið komið til ta niðurstøðu, at mælt verður frá at samtykkja uppskotið soleiðis, sum tað fyriliggur.

Nú fyrsta kvartal er farið av



2018, og skipanin so smátt er farin at virka, er merkiliga friðarligt í mun til 2017.

Kanska broytingarnar ikki eru so ógvusligar sum onkur royndi at mála tær til.

Um 2018 vita vit, at kvoturnar fyri uppsjóvarfisk minka. Tað hevur sjálvandi ávirkan á hýrurnar, men hesi sveiggini hava altíð verið og koma framhaldandi at verða.

Eisini koma nakrar kunngerðir í samband við fiskivinnunýskipanina.

Men fiskurin skal framvegis fiskast, manningarnar fáa sina hýru, og avlop skal vera til reiðarí og fyritøkur.







*Páll Hansen helt sína seinastu formansfrágreiðing.*

# Byrokratisk framferð í ITF

**TEKSTUR OG MYNDIR:** ØSSUR WINTHEREIG - PRESS

Nakað av samskifti hevur verið millum altjóða flutningsarbeiðarafelagsskapin ITF, og FMU, sum er samstarvið millum Maskinmeistarafelagið, Skipara- og navigagørfelagið og Fiskimannafelagið, um sáttmálarnar hjá manningarfeløgunum.

- Tað vísur seg, at ITF hevur ringt vit at góðtaka okkara sáttmálar, og vit skulu søkja um góðkenning av teimum.

- Hettar halda vit vera eina sera byrokratiska framferð, segði Páll Hansen. Allir okkara sáttmálar eru umsettir til enskt og sendir til ITF.

- Vit hava eisini sent fyrispurning til ITF um hettar, og vit vístu samstundis á, at vit ikki skilja, hví teirra eftirlitsfólk ikki eru kunnað um, at føroysk skip við føroyskari manning ikki eru FOC-skip.

Tá tað kemur til FOC, má eg bara viðganga, at her hava vit ein trupulleika, og hann er, at manningarfeløgini ikki kunnu finna eitt felags stev í hesum máli.

Tey trý manningarfeløgini stovnaðu fyri nøkrum árum síðan felagsskapin FMU (Faroese Maritime Union), sum hevði til endamáls at taka sær av sáttmálaviðurskiftunum fyri útlendingar, sum sigla í FAS. Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag (FSN) finna út av at samstarva í felagsskapinum, men so steðgar eisini upp.

*Framhald á næstu síðu >>*

- Hesin trupulleiki er vaksin nógv í 2018. FSN ivast í støðu sínari innan FMU og umhugsar at taka seg úr felagsskapinum. Føroya Fiskimannafelag hevur ongantíð megnað at samstarva, og nú flagga reiðarar síni skip út, segði Páll Hansen.

Trupulleikin her er tíanverri, at tað mangla føroyingar, sum hava førleika sum fulltiknir dekkarar innan handilsskipaflotan.

Men positivt er tað, at vit nú ongar viðmerkingar hava á Flag State performance Table frá International Chamber of Shipping.









Framhald á næstu síðu >>



*Atkvøtt var bert um nevndarlimir og tiltakslimir.*

# Nýggja nevndin

**TEKSTUR OG MYNDIR:** ØSSUR WINTHEREIG - PRESS

Á nevndarvalinum varð John Højsted afturvaldur.

Nývaldur í nevndina varð Jóhan Mørkøre, og hann tekur sæti hjá Jóan Petur Patursson, sum ikki stillaði upp aftur.

Í nevnd felagsins sita nú Ólavur Gunnarsson, Regin Olsen, Hans Ingvard Joensen, John Højsted og Jóhan Mørkøre.

Tiltakslimir eru Daniel Nielsen og Róald Johannesen



*Jóan Petur Paturseon legði frá sær, og John Højsted (høgrumegin) var afturvaldur í nevndina.*



*Róald Johannesen var valdur til tiltakslim í nevndina.*



*Daniel Nielsen var valdur til tiltakslim í nevndina.*












# Vit tryggja orku til vinnulívið

Við okkara royndum, vitan og førleikum tryggja vit orku til húsarhaldini, stovnar og vinnuna.

Kring landið hava vit bensinsølustøð og Fast-handlar.

Skipini bunkra hjá okkum í best útgjørda terminali í Norðuratlantshavi.

Og hvørja ferð eitt flogfar lyftir seg upp frá vøllinum í Vágum, hevur tað frammanundan tikið brennievni frá okkum.

Tel 34 35 00 www.effo.fo

effo føroya orkufelag



*- Vit eiga at selja okkum upp á kvalitet og ikki girða okkum inni við okkara heimligu krøvum, sigur Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum.*

# Stívrend støða elvir til útflagging

**Vit varðveita ongi maritim arbeiðspláss og skapa so slettis ongi nýggj við at girða okkum inni og nokta at síggja í eyguni, at maritimi arbeiðsmarknaðurin er ein globalur arbeiðsmarknaður. Tað sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, nú handilsskip við føroyskum sáttmálum hava ilt við at fáa føroyskar dekkarar.**

**TEKSTUR OG MYND:** INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tað er vorðið alsamt truplari hjá føroyska farmaflotanum at fáa fatur á føroyskum dekkarum, og trýstið á sáttmálarnar veksur, tí reiðarí vilja sleppa at mynstra útlendskar dekkarar í staðin – til bíligari hýru væl at merkja.

Føroya Fiskimannafelag sigur kortanei. Skulu útlendskir dekkarar umborð á føroysk farmaskip, sum hava føroyskan sáttmála, so skulu teir eisini lønast eftir tí sáttmálanum, er greiði boðskapurin.





Tað elvdi í vár til eina orrustu ímillum reiðaríið Frakt & Sand í Runavík og Fiskimannafelagið. Partarnir blivu ikki samdir, og reiðaríið hótti við at gera seg leyst av føroyska sáttmálanum við at flagga út. Tað hevur reiðaríið tó ikki gjørt enn.

> **– Vit hava ikki sum siðvenju at útbúgva dekkarar, og upptøkan til útbúgvingina sum skips-atstøðingur í Klaksvík er lítil. At skúlakravið er so høgt, sum tað er, tað økir helst heldur ikki um hugin hjá fólki at velja ta útbúgvingina.**
>
> Ólavur Gunnarsson

## Ókonsekvent

Tó at Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, partvís skilir óttan hjá Fiskimannafelagnum fyri, at sáttmálin skal blíva kollrendur av bíligari, útlendskari arbeiðsmegi, so harmast hann fastlæstu støðuna, sum valdar viðvíkjandi dekkaratrupulleikanum. Avgjørda og ófrávíkiliga støðan hjá Føroya Fiskimannafelag ger ikki frammanundan vánaliga stevið í FMU (Faroe Maritime Union), sum er samstarvsfelagsskapurin hjá føroysku manningarfeløgunum, betri, heldur hann.

- Eg skal viðganga, at eg sjálvur eri í tvístøðu, tí sum fakfeløg skulu vit jú verja okkara sáttmálar og forða fyri, at teir verða undirbjóðaðir. Men samstundis eru vit noydd at síggja í eyguni, at maritimi arbeiðsmarknaðurin er ein globalur arbeiðsmarknaður, tá talan er um farmaflutning. Viðurkenna vit ikki tað, so er stórur vandi fyri, at vit missa alt á gólvið.

- Fiskimannafelagið er eftir mínum tykki ikki serliga konsekvent í síni støðu, tí felagið hevur bara sáttmála við farmaskip, sum hava føroyskan eigara. Men í FAS eru hópin av skipum við útlendskum eigarum. Var konsekvensur í arferðini hjá Fiskimannafelagnum, so kravdi tað, at hesi skipini eisini komu undir føroysku sáttmálarnar og rindaðu føroyskar hýrur. Men tað ger felagið ikki. Tað setir bara krøv mótvegis FAS-skipum við føroyskum eigarum, sum tískil mugu virka undir nógv strangari sáttmálatreytum enn FAS-skipini við útlendskum eigarum, staðfestir Ólavur Gunnarsson.

> **– Verður ein loysn ikki funnin, fara vit at missa. Eisini Fiskimannafelagið fer at missa, tí føroysku skipini í FAS fara at flagga út so hvørt sum tey renna seg í trupulleikan at fáa føroyskar dekkarar.**
>
> Ólavur Gunnarsson

## Føroyskur kvalitetur

Hann heldur, at Føroya Fiskimannafelag eigur at fáa eyguni upp fyri, at alt ov fáir dekkarar eru tøkir á føroyska arbeiðsmarknaðinum til at nøkta tørvin, og at absolutt onki bendir á, at tann støðan fer at broytast.

- Vit hava ikki sum siðvenju at útbúgva dekkarar, og upptøkan til útbúgvingina sum skipsatstøðingur í Klaksvík er lítil. At skúlakravið er so høgt, sum tað er, tað økir helst heldur ikki um hugin hjá fólki at velja ta útbúgvingina.

- Hinvegin hava vit eina langa siðvenju at útbúgva maritimar yvirmenn, og teir hava altíð kunna selt seg um allan heimin upp á kvalitet heldur enn at girða seg inni við teirra heimligu krøvum. Tað eiga dekkararnir eisini at gera. Tað má bera til at finna eina loysn, har reglan er, at dekkararnir við føroyskum farmaskipum eru føroyingar, men at tað so ber til at supplera við útlendingum í tann mun, tað er neyðugt.

- Verður ein loysn ikki funnin, fara vit at missa. Eisini Fiskimannafelagið fer at missa, tí føroysku skipini í FAS fara at flagga út, so hvørt sum tey renna seg í trupulleikan at fáa føroyskar dekkarar.

## ITF tryggjar góð kor

Ólavur Gunnarsson undrast á, at Fiskimannafelagið ikki kann góðtaka, at útlendingar mynstra eftir øðrum sáttmálum, tó at hesir eru góðkendir av ITF (International Transport Workers Federation), sum er altjóða felagsskapurin av fakfeløgum í flutningsvinnuni.

- Føroya Fiskimannafelag er bæði einsamalt og gjøgnum FMU limur í ITF. Hví eru teir tað, tá teir ikki viðurkenna sáttmálarnar, sum ITF varðar av? Tað er jú aðalmálið hjá ITF at tryggja góð og sømilig manningarkor og at forða fyri sosialari dumping, sigur hann.



*Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag, stendur fast. Hansara felag fer ikki at góðtaka, at útlendingar mynstra fyri lægri hýru við føroyskum farmaskipum, og hesum hevur hann verið í London og greitt ITF frá.*

# Fiskimannafelagið stendur fast

**Jan Højgaard óttast sosiala dumping, um Fiskimannafelagið fer at víkja frá føroysku sáttmálunum. Um trupulleikin bara er at manna skipini, so ber til at mynstra útlendingar eftir føroysku sáttmálunum, heldur hann.**

**TEKSTUR OG MYND:** INGOLF S. OLSEN – PRESS

- At ITF góðkennir, at føroysk skip brúka sáttmálar, sum eru verri enn okkara, tað er stak óheppið. Men tað fær ikki okkum at glíða í koblingini, tí gera vit tað, so er hurðin opin fyri sosialari dumping og undirgraving av okkara sáttmála.

Tað sigur Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag, nú manningarsáttmálin fyri farmaskipini er komin undir trýst, tí skipini fáa ikki føroyskar dekkarar.

Í sambandi við málið hjá Frakt & Sand í vár var hann í London og greiddi ITF frá støðuni hjá Fiskimannafelagnum.

- Vit hava breiða uppbakking í ITF, men har eru eisini feløg, sum organisera bíliga, útlendska arbeiðsmegi, ið hava keypt sær vælvild og nú enntá eru partur av ITF-leiðsluni, sigur Jan Højgaard.

## Viðkvom sjóvinnutjóð

Formaðurin í Fiskimannafelagnum leggur dent á, at Føroyar eru ógvuliga viðkvæmar sum sjóvinnutjóð, tí landið er so lítið og fáment.

- Tá so føroyska sjóvinnan fer í samstarv við fakfeløg við bíligari arbeiðsmegi eystanfyri, eru vit uppi ímóti sterkum kreftum. Hesi feløg og teirra lágu hýrur verða jú eisini góðtikin í londum rundan um okkum, eitt nú í Íslandi og Noregi.

- Men vit standa fast. Tað mugu vit. Vit vilja fyrst og fremst halda óskrivaðu grundlógina, ið er felags grundarlag undir øllum fakfeløgum tvørtur um landamørk, nevniliga altíð at berjast ímóti sosialari dumping, sigur Jan Højgaard.





# 17 maskinmeistarar fingu prógv

**TEKSTUR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS. **MYNDIR:** ERLAND HENTZE RASMUSSEN

Ikki færri enn tilsamans 43 maskinmestarar, skipsførarar og skiparar fingu prógv í Vinnuháskúlanum fríggjadagin 22. juni, so Skálin var so fullur av avvarðandi, sum hann neyvan hevur verið fyrr.

## Fjøltáttaðir møguleikar

Millum røðararnar í ár var nýggi formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Ólavur Gunnarsson, og hann var bjartskygdur maskinmeistaranna vegna. Hann segði millum annað soleiðis:

- Eg dugi ikki at nevna nakra aðra útbúging, har møguleikarnir eru so nógvir og fjøltáttaðir sum hjá okkum maskinmeistarum. Vit kunnu snøgt sagt bjóða okkum fram á øllum pallum, bæði á sjógvi og landi, nær sum fjarð.

- Tað mest síðbundna eru størvini á sjónum, har okkara maskin-meistarar eru millum teir best umtøktu og sostatt at finna allastaðni, tað verður seg eitt nú á pallum, frálandaskipum, handilskipum og fiskiskipum, og eru hesir frálíkir ambassadørar fyri okkara útbúgving og ikki minst fyri okkara land.

- Á landi eru maskinmeistarar eisini at finna sum lyklapersónar í fleiri av grundfunksjónunum, sum skulu til fyri at hava eitt nútímans samfelag koyrandi – teir eru longu at finna á orkuverkum, brennistøðum, vatnverkum, í leiðandi funktiónum innan trygd, eftirlit, útbúgving, heilsu og infrakervi, umframt á vinnuvirkjum, men tað stinga seg alsamt fleiri starvsøki upp, so hvørt samfelagið verður útbygt við størri vinnueinndum og bygningum annars. Har skal holl teknisk vitan til at standa fyri tí partinum bæði í planlegging, byggifasuni og í eftirfylggandi rakstrinum og viðlíkahaldinum av tekniska útbúnaðinum.

- Soleiðis hava tit nomi tykkum eina útbúgving, sum avgjørt peikar frameftir, har starvsmøguleikarnir eru í rúkandi menning, og gevur hettar tykkum frælsi at velja fyrst eina leið, og síðani at skifta kós og royna seg við heilt øðrum spennandi avbjóðingum, um tað er tað tit vilja.



*- Gloymið ongantíð tykkara uppruna, og verðið altíð ímóti øðrum, sum tit ynskja, at onnur skulu verða ímóti tykkum, segði Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum millum annað í síni røðu.*



*Rigmor Dam, landsstýriskvinnan í mentamálum, segði eisini nøkur orð á hátíðarløtuni á Vinnuháskúlanum.*



*Linjohn Christiansen, trolaraskipari og borgarstjóri í Skálavík, var gestarøðari í ár.*





***Nýútbúnu maskinmestararnir vóru 17 í tali:***
***Maskinmeistarar juni 2018:*** *Bárður Johnsson Heinesen, Bárður Jacksson Toftegaard, Svenning Winther Hansen, Bogi Alvason Justinussen, Torvald Steingrímsson, Dan André Rasmussen, Benjamin Leo Nikulásson, Róaldur Jakobsen, Jim á Horni, Hans Joensen, Jens Tummas Næs, Leo Joensen, Hilmar Súni Bech, Tórarin Hansen, Grímur Rasmussen, Regin Lindenskov og Torleif Thomassen.*
***Virðislønir:*** *1. Grímur Rasmussen, grindaknív frá SEV.*
*2. Benjamin Leo Nikulásson, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.*
*3. Jim á Horni, Kikara frá Norðoya Sparikassa.*
***Ídnisvirðisløn:*** *Regin Lindenskov, lummaur frá Skansi Offshore.*

## Standið saman

Ólavur Gunnarsson gloymdi í síni røðu ikki at birta undir samhaldsfesti og trúfesti á arbeiðsplássunum, sum nýklæktu yvirmenninir nú skulu manna.

- Eitt er útbúgving, annað er tað verðuliga lívið við øllum, sum har til hoyrir. Eg vil heita á tykkum at møta framtíðini við árræði, men tó við eyðmýkd. At tit varveita viljan at læra og taka ímóti góðum ráðum. Verðið ikki bangnir fyri at býta tykkara vitan og hjálpa, har tit kunnu.

- Sjálvsøkni røkkur sjáldan langt, og saman standa vit altíð sterkari, á tí langa bananum. Minnist til altíð at verða loyalir og at hava tað góða huglagið, soleiðis at tit byggja upp góðar relasjónir við starvsfelagar og onnur, tit umgangast.

- Gloymið ongantíð tykkara uppruna, og verðið altíð ímóti øðrum, sum tit ynskja, at onnur skulu verða ímóti tykkum.

- Tolni skal til, fyri at fylla leypin, áðrenn farið verður undir byrðuna. Tí eru ráðini frá mær at dvølja við avbjóðingina og geva tykkum stundir at búnast. Tit eru til reiðar at taka næsta stigið upp eftir stiganum. Tykkara tíð á ovastu rók skal nokk koma, um tað er har, tit vilja vera, og tá er umráðandi at verða væl ílatin til avbjóðingina, segði hann millum annað.

Ólavur Gunnarsson endaði sína røðu við at minna á, at Maskinmeistarafelagið altíð er til dystin fús at hjálpa og vegleiða sínar limir.

- Felagið er til fyri tykkum, so smæðist ikki við at brúka tað, segði hann.



*Tilsamans 43 maskinmeistarar, skipsførarar og skiparar fingu prógv hesaferð, so Skálin á Vinnuháskúlanum var stúgvandi fullur.*




BAADER-TØKNINGUR VIÐ ALTJÓÐA FORMATI

**TÚ** SKALT TRYGGJA FISKIVINNUNI **STØRRI VINNING**

Hevur tú royndir við framleiðslutólum og skil fyri el-tøkni? Dámar tær at ferðast og arbeiða uttanlands? Dugir tú væl at samskifta og ert tú álitisvekjandi?

**Og ikki minst:** Hevur tú ein brennandi hug at gera títt til at fiskivinnan klárar seg betur hvønn dag? **So er Petur Larsen rætta valið til tína yrkisleið.**

**Umsóknarfreistin er nú.** Send tína umsókn til starv@pl.fo.

Vilt tú vita meir, so set teg í samband við Johnny Klein Olsen, framleiðsluleiðara, á jko@pl.fo ella ring +298 73 93 34

BAADER Food Processing Machinery · fomaco FOOD MACHINERY COMPANY · MOSCA STRAPPING SYSTEMS · euskan++ FISH HANDLING SYSTEMS

PETUR LARSEN Since 1971

Petur Larsen P/f · Postbox 64 · FO-530 Fuglafjørður · tel +298 775 775 · fax +298 775 776 · pl@pl.fo

SENDISTOVAN




# Virksemið krevur góðar maskinur og gott fólk

*Her sæst oman yvir ein størri part av verksmiðjuni.*

**At Bakkafrost er ein altjóða fyritøka, merkir tú longu, tá tú stígur inn um gáttina í móttøkuni á Glyvrum. Her skalt tú kekkast inn, og tú fært band um hálsin við navninum, áðrenn tú sleppur inn at heilsa upp á tann, tú hevur avtalu við. Eg skuldi hitta tekniska stjóran á Bakkafrost, Brian T. Højgaard.**

**TEKSTUR OG MYNDIR:** GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN - PRESS

Tað er øðrvísi, men ongin bági at hava ørindi á Bakkafrost. Hendan altjóða fyritøkan, sum hevur so stóra framgongd á mongum økjum, er eisini øðrvísi á fleiri økjum, enn vit eru von við. Her verður onki latið til tilvildina, nakað, sum ivaleyst er orsøkin til, at Bakkafrost gjørdist tann altjóða fyritøkan, hon er í dag.

Eftir at vera kekkaður inn, fingið band við navni um hálsin, verði eg boðin innum. Eg siti í sofuni undir stóru trappuni í nýggja bygninginum, tá tekniski stjórin á Bakka, Brian T. Højgaard, kemur eftir mær og bjóðar mær víðari upp á skriv-stovu sína.

Vit eru setstir. Her er ruddiligt á skrivstovuni. Á borðinum stendur ein telda við tveimum skermum. Her kann maskinstjórin ella tekniski leiðarin á Bakka, sum formliga heitið hansara er, fylgja við øllum teimum mongu skipanunum á virkinum, sum maskinfólk taka sær av. Og maskinurnar og tøkniligi út-búnaðurin er nógvur, fjølbroyttur og framkomin.

Ábyrgdarøkið hjá Brian T. Højgaard er nýggja og stóra virkið á Glyvrum, prosessing-virkið í Kollafirði og prosessing-virkið í Suðuroy. Hann hevur onki við sjálva alingina og skipini at gera.

*Framhald á næstu síðu >>*

NAVN: Brian T. Højgaard
FØDDUR: 1981
UPPVAKSIN: Á Skála
BÚSTAÐUR: Norðragøta
ÚTBÚGVING: Maskinmeistari og framleiðsluverkfrøðingur
STARV: Tekniskur leiðari á Bakka
HJÚNASTØÐA: Giftur við Tóru Persson
BØRN: Dávid, 10 ár, og Bjørg, 2 ár



*Brian T. Højgaard, tekniskur leiðari á Bakka, á skrivstovu sínari á Glyvrum.*

## Seytjan mans

Á teknisku deildini á Bakka eru seytjan mans: Ein húsavørur, sum er timburmaður, ein maður arbeiðir við at ansa maskinunum burturav, har eru ófaklærdir menn, maskinsmiðir, elektrikarar, maskinistar, og fleiri við maskinmeistaraútbúgving.

- Eg havi ábyrgdina av, at alt koyrir alla tíðina, tað er, at eg skal syrgja fyri, at allar uppgávur eru mannaðar alla tíðina; eg havi eftirlit við, at tingini verða gjørd, at úrtøkan er í lagi, og steðgar onkur skipan av onkrari orsøk, skal eg syrgja fyri, at hon kemur aftur at koyra skjótast gjørligt. Men eg komi sjáldan niður at skrúva, sovorðið, sum tú setur í samband við maskinmeistaran, sigur Brian T. Højgaard.

Tað er altso skipanin og stýringin av teknisku útgerðini, sum tekniski leiðarin hevur ábyrgdina av.

- Vit arbeiða rættiliga nógvar tímar, og tískil nýta vit eisini arbeiðsmegi uttanífrá – serliga í vikuskiftum. Tí partinum skal eg eisini skipa fyri, tá tørvur er á tí, sigur hann.

## Trý virki í einum

Virksemið á Bakka er í grundini í trimum. Har er kassavirkið, tað er virkið, sum ger flamingokassar, sum verða nýttir í laksaútflutninginum. Síðani er eitt stórt kryvjivirki, og at enda er eitt stórt flakavirki.

- Á kassavirkinum hava vit maskinur, sum gera kassar, og har hava vit eitt dampketilanlegg upp á 7,2 megawatt. Í kryvjingini hava vit blóðgi- og kølitangar, kryvjimaskinur, stórar greytarar og tólmenni at seta kassar á plattar við. Nakað av heilum laksi verður fryst, so vit hava stórar frystarar – og frystigoymslu.

- Í flakahøllini hava vit avhøvdarar, flakamaskinu, vatnpakkimaskinu, plátu- og spiralfrystarar, og fleiri aðrar maskinur. So her er ein rúgva av maskinum, sum okkara fólk skulu halda við líka og so framvegis, sigur Brian T. Højgaard.

## Stórar skipanir

Á einum virki sum Bakkavirkinum er neyðugt við stórum og góðum skipanum á nógvum økjum, og tað hava tey eisini á Bakka. Til dømis er køliskipanin stór –



*Partur av nýggja Bakkafrost á Glyvrum.*



*Kompressararúm til køling. Hetta verður nýtt til køling og innfrysting av fiskinum. Kapasiteturin ella styrkin er fýra megawatt.*

beint yvir fýra megawatt av orku tilsamans. Skipanin er ikki rættiliga so stór sum á uppsjóvarvirkjunum, men hon er rættiliga stór kortini.

Virkið hevur ikki loyvið at koyra spillvatn á sjógv, tískil hava tey eina stóra spillvatnsskipan.

- Vit gera okkara egna klor fyri ikki at fáa sjúku. Vit hava eisini eina stóra skipan til slógv. Í løtuni koyra vit eini 60 til 80 tons av slógvi um dagin, og tað verður koyrt til Salmon Proteins á Eiði, og haðani verður tað selt sum minkafóður, greiðir hann frá.

Aktuellar ætlanir eru annars um at fara undir at gera lýsi úr slógnum. Lýsið skal gerast á Havsbrún og nýtast til "pet-food". Roknað verður við, at tann framleiðslan fer í gongd um einar tveir mánaðir.

- Krøvini til pet-food eru rættiliga strong í mun til framleiðslu til minkafóður. Sum eg skilji tað, so eru krøvini til pet-food næstan líka strong, sum tá talan er um framleiðslu til mannaføði, sigur Brian T. Højgaard.

## Meistari og verkfrøðingur

Brian T. Højgaard hevur starvast á Bakkafrost í fýra ár. Hann byrjaði sum tekniskur verkætlanarleiðari. Tá nýggja virkið stóð liðugt fyri tveimum árum síðani, fekk hann starvið sum tekniskur leiðari.

Hann er bæði útbúgvin maskinmeistari og verkfrøðingur. Maskinmeistaraútbúgving tók hann í 2008. Haðani fór hann á universitetið í Aalborg at lesa framleiðsluverkfrøði, og hann var fyrsti maskinmeistarin yvirhøvur, ið tók útbúgving í framleiðsluverkfrøði á Aalborg universiteti.

Tá hann var útbúgvin framleiðsluverkfrøðingur, fór hann at starvast hjá Tetra Pak í Danmark í trý ár. Tetra Pak er ein velduga stór fyritøka, sum millum mangt annað ger føroysku mjólkarpakkarnar. Brian T. Højgaard arbeiddi á processingdeildini hjá Tetra Pak í Aalborg.

Seinastu fýra árini hevur hann so starvast á Bakka á Glyvrum.

## Fáir steðgir

Á eini verksmiðju sum nýggju verksmiðjuni hjá Bakkafrost á Bakka á Glyvrum er avgerandi, at arbeiðið alla tíðina koyrir sum ætlað. Og tað er júst avbjóðingin, sum Brian T. Højgaard hevur í sínum starvi sum teknsikur leiðari.

- Eg vil siga, at tað týdningarmesta og tann størsta avbjóðingin er júst at hava alt

*Framhald á næstu síðu >>*



*Mynd tikin inn á kassavirkinum hjá Bakkafrost.*

koyrandi alla tíðina. Her arbeiða eini tveyhundrað fólk og steðgar ein linja, so standa nógv fólk og bíða. Í flakahøllini til dømis arbeiða 150 fólk, so tað ávirkar nógv, um ein linja gerst óvirkin, sigur hann.

Maskinur og fólk skulu sjálvandi koyra væl saman, og maskinurnar mugu rigga optimalt fyri at úrtøkan av hvørjum einstøkum laksi skal vera so góð sum til ber.

- Onkrir byrjunartrupulleikar eru enn – eitt slag av fløskuhálsum, men tað arbeiða vit alla tíðina við at betra. Vit hava eina avbjóðing við at fáa skipanina at rigga betur við at fáa kassar á plattar, og vit arbeiða eisini við at fínstilla spillvatnsskipanina. Hetta eru ting, sum eru týdningarmikil, og sum vit fáa uppá pláss. Tað er ikki soleiðis, at hesi tingini ikki rigga, men tey skulu fínstillast soleiðis, at øll bíðitíð hvørvur, sigur Brian T. Højgaard.

Higartil hava allar maskinur og allur teknikkur riggað so mikið væl, at ongin heilur dagur er farin burturímillum av trupulleikum á tí økinum.

## Synisgluggar

Tá vit eru lidnir við samrøðuna hendan dagin, bjóðar tekniski leiðarin mær at síggja virksemið á Bakka. Vit koma út í langar, ljósar og nossligar gongir við stórum glasrútum á báðum síðum. Her síggja vit, við at fara úr einum rútaopi til tað næsta, og av einari gong yvir á næstu, alla framleiðsluna á virkinum. Onkrar av myndunum til hesa grein eru tískil tiknar inn ígjøgnum stóru rútarnar ella vindeyguni, sum eru sýnisgluggar inn á verksmiðjuna úr ymsum herðashornum.

Ein av fyrstu sýnisgluggunum, vit koma til, eru tólmennini (robottarnir), sum flyta fyltar flamingokassar á plattar. Tólmennini lyfta 28 kassar á ein platt um minuttin.

Soleiðis ganga vit frá einum sýnisglugga til tann næsta. Eftir einum bandi fara heilir laksar, á einum øðrum bandi verða laksarnir lagdir soleiðis, at teir liggja eins – við rygginum uppeftir. Komnir víðari síggja vit laksarnar verða flakaskornir, og stutt eftir verður skræðan skorin av; síðani verður skorið í porsjónir, pakkað og so framvegis. Øllum kanst tú fylgja við úr frálíku sýnisgluggunum í gongunum uppi yvir verksmiðjuni.

Eftir at hava sæð verksmiðjuna, vísir tekniski stjórin





*Framhald á næstu síðu >>*



*Á loftinum á nýggja Bakkafrost. Her eru nógvar innstallasjónir, sum eru øðrvísi enn á øðrum eldri virkjum. Hiðani verður nógv stýrt, millum annað sprinklaraskipanirnar, sum eru allastaðni á virkinum uttan í frystigoymsluni.*

mær upp á loftið. Her eru nógvar innstallasjónir, sum annars plagdu at fylla upp alla møguliga aðrastaðni á eldri verksmiðjum.

Av loftinum fara vit úr einum rúmi í annað fylt við maskinum, kompressarum, talvum, verkstøðum og líknandi. Alt sovorðið, sum fær maskinmenn og maskinmeistarar at kenna seg heima.

Eftir at hava gingið ein túr gjøgnum kassavirkið, venda vit nøsini aftur ímóti skrivstovuni hjá Briani T. Højgaard. Vit fara upp gjøgnum trappur og niður gjøgnum trappur, inn í eina gong fyri og aðra eftir. Einaferð enn síggi eg, hvussu stórt hetta nýggja virkið á Bakka er, hesaferð úr einum heilt øðrum sjónarhorni.



*Maskinurnar og tólini á virkinum eru mong at hava eftirlit við.*







KSS ER UMBOÐ FYRI IBERCISA Í FØROYUM, DANMARK, GRØNLANDI, SVØRÍKI, ONGLANDI, SKOTLANDI, ÍRLANDI, ÍSLANDI OG NORRA.

FLEIRI FYRIMUNIR,
LÆGRI KOSTNAÐUR

Eldrivnu spølini frá Ibercisa eru at finna umborð á yvir 120 trolarum kring heimin. Spølini hava fingið avbera góð ummæli. Spølini hava minni tørv á orku, og eru harvið bíligari í rakstri og meira umhvørvisvinarlig.





Ynskir tú at hoyra meira um eldrivnu spølini? Set teg í samband við okkum.

+298 472030 KSS@KSS.FO WWW.KSS.FO

KSS
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ




*Framhald á næstu síðu >>*




*Ólavur Gunnarsson hugleiddi millum annað um, hvussu tað er hjá sjómonnum at vera heim millum túrar.*

# Lítillátni maskinmeistarin

**Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum hugleiddi á Sjóvinnuforum um ymisk viðskifti hjá maskinmeistarum. Maskinmeistarafelagið skipaði saman við Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Sjóvinnustýrinum fyri Sjóvinnuforum á Vinnuháskúlanum.**
**Endamálið var at lýsa støðuna hjá sjófólki, vinnumøguleikar, útbúgving o. a. Her er brot úr framløguni hjá formanninum.**

**TEKSTUR OG MYNDIR:** ØSSUR WINTHEREIG - PRESS

Maskinmeistarin, lítillátni problemknúsarin, men verður hann virðismettur nóg høgt?

Tað er ikki uttan orsøk, at vit hava valt hesa forfjónaðu tilveruna. Generelt seta vit til eina og hvørja tíð fakliga dugnaligheit fram um persónliga promovering.

Um vit ikki gjørdu tað, høvdu vit helst heldur valt at veri skiparar.

Maskinmeistarin fer javnan langt út um, hvat krevjast kann av honum, fyri at loysa teir trupulleikarnar, sum kunnu koma fyri, úti á tí baldruta havinum.

Men mær tykist ikki, at teir verða virðismettir nóg høgt.

Hvørjaferð hann hevur gingið í gjøgnum eld og vatn fyri at sleppa undan at bróta túr av, verður hettar bara tikið sum ein sjálvfylgja.

Hinvegin, tá tað kemur fyri, at hann av onkrari orsøk ikki kann loysa onkran trupulleika, verður hann nærum stemplaður sum


*Eini 60-70 fólk vóru og lurtaðu á Sjóvinnuforum, sum dagurin á Vinnuháskúlanum var kallaður.*

ódugnaligur, og verður mista inntøkan á ein ella annan hátt smurd av upp á hann, ella í hvussu so er sleppur hann at hoyra fyri hettar.

Soleiðis haldi eg, at maskinmeistarin, hóast hann møguliga ikki hevur evstu ábyrgdina umborð, møguliga er tann, sum verður útsettur fyri mestu strongdini.

Eisini tá ið skipið er komið inn at landa, hvør er tá sum oftast noyddur at verða seinastur í land, og hvør má eisini gera umvælingar á útbúnaðin millum túrarnar og taka sær av bunkring? Jú, aftur her er talan um lítillátna problemknúsaran.

Mín greiða fatan er, at her restar væl í, til at hesin fær ta viðurkenning, hann hevur uppiborið.

Tað kostar einki at rósa og takka einum, sum hevur tað uppiborið. So minnist til at gera tað næstu ferð tit hava møguleikan.

## Nýggj krøv

Verðin er umbroytilig, og her er teknikkur og mekanikkur ikki nakað undantak, heldur tvørturímóti. Her ræður um at fylgja við tíðini, tá førleikakrøvini økjast. So mín spurningur er: Hvussu følir tú teg ílatnan at taka við nýggjum avbjóðingum?

Vit vita væl, at alt tað, sum var tað nýggjasta og mest framkomna fyri 10 árum síðani, í dag allarhelst er avoldað og allarhelst stendur fyri at verða útskift við meira framkomna útgerð.

Hettar er lívsins gongd.

Men hvussu væl verða vit íklødd at taka í móti hesum nýggju avbjóðingum. Jú bevares, eru tað nøkur reiðaríir, sum eru ófør at senda fólk á skeið at førleikamenna seg, men eg trúgvi ikki, at eg lúgvi, tá ið eg sigi, at sum oftast ert tú latin til tín sjálvan at finna út av, hvussu nýggja vidundrið hongur saman.

Er hettar rímiligt, og hvussu nógv ger arbeiðsgevarin í veruleikanum fyri at menna starvsetta á teimum ymisku økjunum?

Sjálvandi eru teir noyddir at syrgja fyri, at lógarkravdu skeiðini verða dagførd, men er hettar nokk?

Mítt svar er nei, hvat við teldu-førleika, viðlíkahaldsforritum og leiðsluførleikanum, hvussu nógv verður gjørt burtur úr hesum, eg eri bangin fyri lítið og einki, og ert tú ikki upfront sjálvur, verður tað trupult at fylgja við.

Í dag er alt samskifti umvegis teldur ella onnur samskiftistól, og megnar tú ikki hettar ert tú úti í kuldanum.

Arbeiðsdagurin við atliti til hettar verður trupul, tí óneyðuga nógv av arbeiðsorkuni fer til at royna sum frægast at yvirkoma hetta.

Eg meini, at tað til eina og hvørja tí áliggur arbeiðsgevaranum at syrgja fyri, at tú ert ílatin at taka í móti teimum broytingum, sum koma, og saman við tær syrgja fyri at førleikarnir verða mentir hareftir,





soleiðis at útbúgvingin stendur mát við nútíðuna og sostatt ikki fellur í virði.

Um ikki, so gongur skjótt tann øvugta vegin. Og innan leingi ert tú afturúrsigldur.

## Trygdin í lagi

Vit maskinmeistarar hava tað fyri at leypa avstað, tá ið brúk er fyri okkum, og ikki so sjáldan hendir tað, at tú ikki sansar umstøðurnar, fyrr enn tú stendur mitt í rokinum.

Tað kann vera talan um alt møguligt, sum á ein ella annan hátt kann viðføra skaðiligan virknað á teg sjálvan.

Men sum útgangstøði er tað tín ábyrgd at verja teg, og tað er harvið eisini tín ábyrgd at syrgja fyri at útgerðin, sum tú skalt nýta til at verja teg, er tøk.

Men eru vit nóg góðir til at nýta útgerðina? Kennir tú teg aftur í fyribrigdinum ”bara líka”? Bara líka inn í maskinrúmið uttan hoyrivernd. Bara líka upp í mastrina uttan línu. Bara líka vaska hettar við avfeittara uttan handskar. Bara líka tetta útstoytslekan uttan frískluftsmasku. Bara líka á verkstaðið uttan trygdarskógvar og bara líka í lastina uttan hjálm.

Hvussu við checklistum, work permits, verða hesi útfylt eftir forskrift? Og hvussu við hvílitíðarskemanum, verður tað somuleiðis útfylt, sum tað eigur.

Eg veit av royndum, at fleiri av tykkum, fyri ikki at siga allir, kenna seg aftur í onkrum av hesum.

Men tað ger ikki gerðina rættari.

Hvør verður tað, sum fer at dragast við tinnitus, hvør verður tað, sum fer at dragast við varandi andadráttstrupulleikar, ella hvør verður tað, sum skal syrgja fyri, at tey eftirsitandi fáa pápan ella mannin aftur, alt hettar, tí at tú ”bara líka” skuldi.

Nei gerið tykkum sjálvum tann beina at nýta ta tíð, tað tekur at vera fyrireikaður til uppgávuna, hvussu lítil hon enn skuldi verið.

Tað er nógv størri skomm ikki at verja seg enn at gera tað.

## Ring samvitska heima

Tað er ein royndur lutur, at sjólívið er nakað serligt. Fyrr var tað soleiðis, at tað í høvuðsheitinum var sjómansins uppgáva at tryggja fíggjarliga grundarlagið undir familjuni, meðan makin syrgdi fyri øllum á heimafrontinum.

Soleiðis er tað ikki longur, nú eru báðir partar á arbeiðsmarknaðinum, og er tað alt meira vanligt, at sjómaðurin yvirtekur taktstokkin á heimafrontinum, tá ið hann er heima, fyri at makin soleiðis kann gera meira burtur úr sínum yrki og áhugamálum annars.

Uttan at generalisera vil eg í ein vissan mun siga, at sjómaðurin onkursvegna hevur ringa samvitsku av at vera so nógv burtur, og hann vil ganga langt fyri at kompensera fyri fráveruna, tá ið hann endiliga er heima.

Eisini er tað vanligt, at tað liggur ein rúgva á láni, ting sum hann sær átrokandi neyðugt at fáa gjørt nakað við, áðrenn hann skal avstað aftur. Tað kann eitt nú verða talan um liðugtgerð ella ábøtur á ella rundan um húsini, ella onnur ting, sum viðkoma nærmastu familjuni.

Hettar kann í stóran mun føra við sær, at sjómaðurin ikki hevur stundir at ganga upp í egin áhugamál og tí hartilhoyrandi sosialiseringini. Sum tíðin líður og børnini gerast eldri, og teirra tørvur á foreldrunum ikki er hin sami, og samstundis sum uppgávurnar í og rundan um húsini fækkast, kann lívið gerast sera einsamalt, fyri ikki at siga keðiligt.

## Egin áhugamál

Tað er ikki rætt at skera alt yvir ein kamb, men tað er ein royndur lutur, at einsemi oftani kann føra til depressión og ella ósunnan lívsstíl, har eitt nú rúsdrekka kann koma sníkjandi inn í tilveruna bara fyri at halda halda hana út.

Hesin ósunni lívstílurin fer fyrr ella seinni at smitta av á restina av familjuni og verður alt ein niðureftirgangandi spiralur.

Við hesi hugleiðing fyri eyga vil eg vísa á týdningin av, at pør gera sær greitt, hvat tað vil siga at liva í einum tílíkum parlagi, og geva hvørjum øðrum rúmd og tíð at pleyga síni áhugamál í tann mun, sum tørvur er á tí.

Tað er sera umráðandi, at tú pleygar tíni áhugamál, pleygar vinmenninar, og nýtur tíð upp á tað sum tú veruliga brennir fyri. Sjálvandi er við hesum ikki sagt, at tú skal lata vera við at takast við tær heimligu skyldurnar, men eg vil bara undirstrika, at tað eina útilokar ikki hitt, og skal tú fasthalda neistan á heimafrontinum, mást tú eisini taka tær tíð til at pleyga teg sjálvan.



# NMF fyllir 100

**TEKSTUR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS. **MYND:** MASKINMEISTARAFELAGIÐ

Í apríl mánað var Ólavur Gunnarsson á sínum fyrsta fundi í NMF (Nordisk Maskinbefäl-federationen), sum formaður í Maskinmeistarafelagnum. Fundurin var í Keypmannahavn 9.-10. apríl.

Stóra evnið hesaferð var hvílitíðarreglur. Í grannalondunum eru strangari reglur um hvílitíðir eisini á veg inni í fiskiflotan, og Ólavur Gunnarsson væntar, at hetta eisini er eitt øki, sum fer at koma meira í brennidepilin her heima, tó at hann ikki heldur, at hvílitíðarreglur er ein spurningur, sum í løtuni fyllir serliga nógv umborð á føroysku fiskiskipunum.

Á NMF-fundinum var eisini umrøtt, at felagsskapurin fyllir 100 ár næsta ár, og ætlanin er at gera fitt burtur úr hesum á várfundinum næsta ár, sum verður í Danmark. Áðrenn tað verður tó heystfundurin í ár, og hann verður í Føroyum.

Annars eigur Ísland NMF-forsetan í hesum forsetaskeiðnum, men sessurin stendur tó tómur í løtuni, tí formaðurin í íslendska maskinmeistarafelagnum fór frá her fyri.





*Bíðað verður eftir mótpartinum í samráðingunum við Fíggjarmálaráðið. Úr vinstru eru tað Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, Sjúrður Heinesen, skrivari í felagnum, Jon Højsted, nevndarlimur, og semingsmenninir Terje Sigurðsson og Símun Absalonsen. Semjan kom til høldar 31. mai.*

# Sáttmálin við KAF er ein avbjóðing

*Maskinmeistararnir undir KAF-sáttmálanum eru afturúrsigldir, og tí vilja vit ikki bara góðtaka ein karm, sum er dikteraður av arbeiðsgevarunum, sigur Ólavur Gunnarsson.*

**TEKSTUR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS. **MYND:** ØSSUR WINTHEREIG

Tað hevur gingið striltið hjá Maskinmeistarafelagnum at fáa sáttmálan við KAF (Kommunala Arbeiðsgevarafelagið) til høldar, og beint áðrenn evstamarkið fyri hetta blaðið var ongin semja at hóma.

Partarnir samráðast tó enn, og Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, vónar at tað fer at bera til at finna semju uttan hjálp frá Semingsstovninum.

Í virðing fyri mótpartinum vil hann ikki fara í smálutir um, hvat skilir partarnar, men hann dylir tó ikki, at tað í fyrsta lagi snýr seg um sjálva lønina.

- Vit eru í roynd og veru í nøkulunda somu støðu sum sjúkraróktarfrøðingarnir vóru í fjør heyst. Maskinmeistararnir sum virka undir sáttmálanum við KAF eru væl og virðiliga afturúrsigldir, og tí vilja vit ikki bara góðtaka ein karm, sum er dikteraður av arbeiðsgevaranum. Har skal meira á borðið, sigur Ólavur Gunnarsson.

KAF-sáttmálin er tann størsti hjá Maskinmeistarafelagnum fyri maskinmeistarar á landi. Millum annað umfatar hann allar maskinmeistararnar hjá SEV og hjá IRF.

## Tvær semjur

Hinir báðir sáttmálarnir fyri maskinmeistarar á landi, við Fíggjarmálaráðið og FAG (Føroya Arbeiðsgevarafelag), komu undir land ávikavist 31. mai og 6. juni. Tilgongdin til tann við Fíggjarmálaráðið var drúgv, og har máttu semingsmenninir uppí, men tann við FAG gekk smidliga og uttan stórvegis stríð.

Sáttmálin við Fíggjarmálaráðið, sum umfatar maskinmeistarar hjá tí almenna á landi og teir hjá Strandferðsluni og umborð á Magnusi Heinason, er ein tvey ára sáttmáli, sum gevur øllum eina lønarhækking upp á 2,3 prosent tað fyrra árið.

Seinna árið hækkar lønin hjá Strandferðsluni við 1,5 prosentum, men samstundis verður munurin ímillum aldursstigini øktur, og nakrar av endalønunum hækka eisini. Umborð á Magnusi Heinason hækkar lønin seinna árið við 2,5 prosentum.

Seinna árið verða alment settu maskinmeistararnir á landi fluttir í nýggja lønartalvu. Av tí, at longri verður ímillum aldursstigini enn nú, og at endalønirnar eisini hækka, verður prosentvísa hækkingin her eitt sindur ymisk fyri hvønn einstakan lønarbólk.

Sáttmálin við FAG, sum umfatar maskinmeistarar í privatum størvum á landi, er eisini ein tvey ára sáttmáli. Hann gevur eina lønarhækking upp á 3,26 prosent tað fyrra árið og 2,56 prosent tað seinna árið.



# FØÐINGARDAGAR Maskinmeistarafelagið:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Steffan Sørensen | Eiði | 7/8-1948 | 70 ár |
| Mikkjal Petersen | Klaksvík | 8/8-1948 | 70 ár |
| Frank Olsen | Skála | 13/8-1948 | 70 ár |
| Max Petersen | Húsavík | 25/8-1948 | 70 ár |
| Andrias Arge | Klaksvík | 11/5-1958 | 60 ár |
| Jógvan Lydersen | Argir | 23/5-1958 | 60 ár |
| Jóhan Hans M. Niclasen | Miðvágur | 4/6-1958 | 60 ár |
| Magni Olsen | Tórshavn | 7/6-1958 | 60 ár |
| Finn Spangenfeldt | Tórshavn | 14/6-1958 | 60 ár |
| Jósvein Rasmussen | Sørvágur | 26/6-1958 | 60 ár |
| Alex Lund Johannesen | Klaksvík | 5/7-1958 | 60 ár |
| Regin Olsen | Klaksvík | 1/8-1958 | 60 ár |
| Jóannes E. Joensen | Klaksvík | 5/8-1958 | 60 ár |
| Kjartan Johansen | Syðrugøta | 28/8-1958 | 60 ár |
| Palle Bærendsen | Tvøroyri | 30/8-1958 | 60 ár |
| Rógvi Aagaard Nielsen | Vestmanna | 12/5-1968 | 50 ár |
| Sjúrður Finnsson | Fuglafjørður | 16/5-1968 | 50 ár |
| Johnleiv Thomsen | Klaksvík | 10/7-1968 | 50 ár |
| Jóhannus Kjærbo | Strendur | 18/7-1968 | 50 ár |
| Jan Norðá | Klaksvík | 26/7-1968 | 50 ár |
| Christian Christiansen | Kirkja | 9/5-1978 | 40 ár |
| Levi Lauritsen | Sørvágur | 19/6-1978 | 40 ár |
| Johnny Durhuus | Hoyvík | 22/7-1978 | 40 ár |
| Kári Jákupsson í Løðu | Miðvágur | 26/8-1978 | 40 ár |
| Jóhan Dam | Hoyvík | 21/5-1988 | 30 ár |
| Poul Heri Selfoss | Klaksvík | 26/6-1988 | 30 ár |





# Frá Maskinmeistarafelagnum

**24-03-2018. MF. Østrøm.**
Aðalfundur í Østrøm, har nýggjur formaður tók við.

**03-04-2018. MF.**
Nevndarfundur, har nýggja nevndin skipaði seg. Á skrá vóru 6 ymisk mál, ímillum annað val av næstformanni og býti av málsøkjum. Regin Olsen varð afturvaldur sum næstformaður, og Jóhan Mørkøre yvirtekur málsøkini hjá Jóan Petur Patursson, sum er farin úr nevndini. Annars verður býtið óbroytt.

Samtykt varð eisini at longja avtaluna við PRESS um útgávu av blaðnum "Maskinmeistarin," við einum ári.

**04-04-2018. MF.**
Sáttmálasamráðingar við FMR um sáttmálarnar hjá SSL, alment settar á landi, Vørn og Magnus Heinason. Aðalfundur í felagnum P/F Fakfelag, har Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, varð valdur í nevndina. Nevndin skipaði seg aftaná við Pæturi Niclasen sum formanni og Óluvu í Gong sum stjóra.

**09-10-04-2018.**
NMF-fundur í Keypmannahavn. Fyri Maskinmeistarafelagið luttóku Ólavur Gunnarsson, formaður, og Sjúrður Heinesen, skrivstovuleiðari.

**13-04-2018.**
Fundur við maskinmeistararnar hjá SEV á Sundi. Umrødd vóru setanarviðurskifti og samráðingarnar, sum liggja fyri framman.

**16-04-2018.**
Sáttmálasamráðingar við FMR.

**19-04-2018.**
Aðalfundur í Ognarfelagnum Lív.

**20-04-2018.**
Fundur við leiðsluna á Vinnuháskúlanum. Umrødd vórðu framtíðar útbúgvingar, útbygging og møguligt promoveringsamstarv.

**24-04-2018.**
Sáttmálasamráðingar við FMR.

**26-04-2018.**
Fundur við umboð fyri Nørresundby Shipping um møguliga at manna við føroyskum maskinmeistarum hjá teimum.

Nevndarfundur, har 7 mál vóru á skrá. Ímillum annað samráðingarstøðan við FMR og sáttmálakrøv til KAF-sáttmálan.

**02-05-2018.**
Fundur við SEV-leiðsluna, har millum annað starvsetanir og umflokkingar vóru umrøddar.

**04-05-2018.**
Samráðingarfundur við FMR. Fundur við maskinmeistrararnar á Arbeiðseftirlitinum, har arbeiðsviðurkifti og annað varð umrøtt.

**11-05-2018. FMA.**
Fyrireikingarfundur til tiltakið "Sjóvinnuforum." Fundurin var í hølunum hjá FMA á Glaðsheyggi.

**12-05-2018.**
Óformellur fundur við semingsmann, har sáttmálastøðan varð umrødd.

**14-05-2018. MF.**
Innkallaður fundur í bráðskundi um íkomnu støðuna í uppsjóvarflotanum, har reiðarar eru byrjaðir at draga kvotukeyp frá óbýttum.

**17-05-2018.**
Fundur við maskinmeistararnar hjá IRF í Leirvík. Á fundinum vórðu arbeiðsviðurskiftini og umstøðurnar sum heild umrøddar.

**24-05-2018.**
Tiltakið "Sjóvinnuforum á Vinnuháskúlanum", har formaður felagsins, Ólavur Gunnarsson, hevði eina framløgu.

**29-05-2018.**
Nevndarfundur. Á skrá vóru 5 mál, teirra millum sáttmálasamráðingar og seming við FMR. Sáttmálakrøvini til KAF-sáttmálan. Sáttmálasamráðingarnar við FAG og støðan í fiskiflotanum.

Semingsfundur við semingstovnin og FMR í Skibsteds Pakkhúsi.

**30-05-2018.**
Semingsfundur - framhald við semingstovnin og FMR í Skibsteds Pakkhúsi.

**01-06-2018.**
Ársfundur hjá ALS. Ólavur Gunnarsson, formaður, og Sjúrður Heinesen, skrivstovuleiðari, vóru við vegna MF.

Semingsfundur - framhald við semingstovnin og FMR í Skibsteds Pakkhúsi. Semingsuppskot handað kl. 12.30, og semja undurskrivað kl. 15.45.

**06-06-2018.**
Sáttmálasamráðingar við FAG um sáttmálan hjá privatsettum á landi.




# Lat okkum hjálpa tær at seta saman fíggjarliga trygdarnetið, so hongur tað ikki á tær

Kundin eigur LÍV. Vinningurin verður borin aftur gjøgnum góðar tryggingar, lágan rakstrarkostnað og eitt munagott avkast á pensjónsuppsparingini.

Kopargøta 1, Tórshavn | **www.liv.fo**